## DAGSINS MEINING

# Ikki nóg búgvin

Tað, sum fór fram á løgtingi og arbeiðsmarknaði í vikuni vísir, at hvørki politiska skipanin ella partar av arbeiðsmarknaðinum eru búgvin at virka í einum framkomnum samfelag, ið skal standa seg í kapping við onnur lond og framhaldandi tryggja borgarum sínum eina høga vælferð.

Kjarnin til óhepnu hendingarnar eru fleiri:
- Partvíst standa fakfeløgini ov spjødd.
- Partvíst er ein partur av maskinmeistarum í hálvalmennum størvum afturúrsigldur samanborið við maskinmeistarar í almennum størvum.
- Partvíst er arbeiðsgevaraleikluturin hjá hálvalmennu fyritøkunum ikki nóg samskipaður.
- Og harafturat er onki samstarv millum samgongu og andstøðu. Tí verður slík tingviðgerð mest meinleík valfundi, har andstøðan roynir at tekkjast teimum, sum av náturligum ávum eru ímóti einum inntrivi.

Í einum fólkaræðiligum samfelag hava vit rætt at skipa okkum í fakfeløg, og tá fakini eru mong, eru feløgini nógv. At Fíggjarmálaráðið hevur sáttmála við 32 fakfeløg er tó ábending um, at samskipan vantar. Feløgini - løntakararnir - høvdu óivað fingið nógv meira burtur úr, um tey vóru skipað í meginfeløg. Feløg kundu virkað hvør sær, men tey kundu verið skipað í størri meginfeløg - í eini "paraplyorganisatión". Úr einum sjónarhorni um rættvísisi eiga maskinmeistarar hjá SEV at forvinna tað sama sum maskinmeistarar í almennum størvum. Henda tillagingin eigur at verða gjørd yvir eitt longri tíðarskeið, og ikki í eini støðu, tá hækkingin kann leggja støðið fyri eitt høgt samfelt lønarkrav í eini tíð við búskaparligari stagnatión, tá lønarafturhald heldur er ynskiligt.

SEV eigur sum arbeiðsgevari helst at vera partur í kommunala arbeiðsgevarafelagnum. Men størri samskipan á hesum øki merkir ikki, at so er leyst. Kommunala lønarlagið má verða samskipað við lønarstigið hjá landinum. So er spurningurin, um landsstýrismaðurin skal góðkenna sáttmálar, sum kann elva til óhepnar støður, ið vit hava upplivað, ella um ein lønarnevnd skal syrgja fyri, at lønarlagið er nøkurlunda eins? Í aktuella málinum helt landsstýrið, at neyðugt varð at leggja uppí. -Men vórðu royndir gjørdar fyri at koma úr fastlæstu støðuni? Og kundu samgonga og andstøða havt samskipað arbeiðið, áðrenn lagt varð uppí?

Tingviðgerðin bendi ikki á, at nøkur roynd varð gjørd at loysa upp fyri støðuni. Og tá so er, hevur politiska arbeiðið kki verið nóg gott. Heldur ikki hevði samband verið við andstøðuna. Og tað kundi havt givið andstøðuni størri ábyrgd, tí støðan at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal góðkenna slíkar sáttmálar, er arvur frá undanfarnu samgongu.

Úrslitið gjørdist ein "valfundur". Slíkum er ikki størsti tørvurin á, tá landið er í kreppustøðu. Tá er tað týdningarmikið at vísa samfelagsábyrgd, sum arbeiðarafeløgini vístu í mai. Ein hægri almennur lønarkostnaður kann bara fíggjast við øktum avgjaldsella skattainntøkum ella almennum sparingum, m.a. uppsagnum, tí útlitini fyri natúrligum inntøkuvøkstri eru ikki tey bjartastu! Henda veruleika mugu vit øll ásanna - eisini politikkarar og fakfelagsleiðarar. Latið okkum læra av mistøkum og manglandi samskifti og fáa ein betri dialog og størri samstarv millum samgongu og andstøðu. Tað, ið fór fram á tingi, er tó ikki eindømi um ringt stev millum andstøðu og samgongu. Tað hevur eyðkent føroyskan politikk alt ov leingi. Her kann núverandi samgonga bróta upp úr nýggjum, um hon vil tað, men treytin er tá tann, at eisini andstøðin spælir við ærligum og konstruktivum kortum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ljós yvir landið, men hvussu leingi?

**Napolion Magnussen**



Og so varð aftur ljós yvir landið, men hvussu leingi?

Sat mikukvøldið og fylgdi við í Útvarpinum, nú Løgtingið setti streymin til aftur við makt. Tað rann mangt mær til hugs ið hevur verði sagt hesar seinastu dagarnar.

Lat meg byrja við Klæmint Weihe: Haldið tað líkist svartasta ongum at ein stjóri í einum kommunalum felagskapi kemur við sovornum svassi um at "tað líkist svartasta ongum at 40 mans kunna leggja landið myrkt". Tú skal sjálvandi kunna úttala teg privat, men sum stjóri í einum felag sum kommunur eiga skal tú viga tíni orð betur og fáa tað við í greinina at tað ikki er sum stjóri í SEV at tú úttalar teg. Hasir menninir hava ongan annan møguleika enn at brúka sín verkfallsrætt!

So komi eg til Bárð Nielsen: Tá ið tú veit, at maskinmenn í almennum starvið liggja væl omanfyri hesar hjá SEV hevur tú eina fullgóða grundgeving fyri at góðkenna eina hækking og at kunna forsvara hana í samráðingunum til heystar. At teir so fáa meira í tilleggum og yvirtíð rakar ikki teg í hesum sambandi. Her er tað grundlønin ið talan er um.

Og so til Tjóðveldisflokkin og Jenis: Tit høvdu tykkara møguleika at broyta kommunustýrislógina í 2003, so at Bárður Nielsen ikki kom í somu støðu sum Karsten Hansen kom í fyri tveimum árum síðani. So at frá tingsins røðarapalli soleiðis at øsa fólk upp sum gjørt varð mikukvøldið er langt úti. Tað skuldi verið heimila løgtingsformanninum at steðga tingfólkið, ið ferð aftan á ferð dittar sær upp á røðarapallin at júka tað sama ummaftur og umaftur, sum Jenis og co gjørdu mikukvøldið.

Henrik Old var, eins og Bjarni Djurholm, rættiliga óhølvaður í sínum orðavali upp til fleiri ferðir, men eitt skal eg geva honum rætt í: At nú í skundi at broyta løggávuna er púra burturvið. Men eitt stendur eftir: Løggávan má skal broytast alt fyri eitt, í øllum førðum áðrenn samráðimgarnar í heyst. Tað skal ongin landsstýrismaður verða triði partur í einum sáttmála, tað skal ongantíð verða ein triði partur í nøkrum sáttmála.

Annars er at siga, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er rættiliga rótutur. Tað er mestsum hvørt ár at okkurt verkfall ella líknandi leggur landið lami, so tað er uppá tíðina at fáa betur skipaði viðurskifti við eitt nú høðussáttmálum og leypandi sambandi ímillum partarnar. So vit mega vóna tað besta frá nevndini ið situr og gerð álitið, sum vónandi kann gerðst grundarlagi undir einum væl betur skipaðum arbeiðsmarknaða. Tí tað er ein ósiður at Løgtingið leggur uppí sáttmálatrætir, ein ósiður ið sum skjótast sleppast má vekk frá.

# YVIRLÝSING frá Føroya Pedagogfelag

**Føroya Pedagogfelag**
*Tórshavn, tann 07-07-2005*

Undirritaða fakfelag mótmælir harðliga, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, hevur noktað at góðtikið eina semju, sum Maskinmeistarafelagið og Elfelagið SEV hava gjørt eftir uppskoti, sum varð lagt fram av semingsfólkunum.

Tað er átaluvert, at landsstýrismaðurin vrakar eitt av pørtunum góðtikið semingsuppskot, sum hevur til endamáls at javna lønina hjá maskinmeistarum, sum starvast hjá SEV, við aðrar maskinmeistarar, ið starvast á landi, serliga tá vit kunnu staðfesta, at sambært viðmerkingunum til kommunu-stýrislógina so er endamálið við góðkenningar-heimildini hjá landsstýrismanninum júst at "tryggja eitt javnt alment lønarlag".

Vit átala samstundis harðliga, at sitandi samgonga hevur longt verandi sáttmála í 5 mánaðar og harvið hevur forðað maskinmeistarunum, sum starvast hjá SEV, at fáa somu løn, sum aðrir starvs-felagar teirra, sum starvast á landi.

Vit vilja harðliga ávara ímóti, at politisku flokkarnir soleiðis leggja seg út í samráðingarættin og verkfalsrættin hjá føroysku fakfeløgunum, og vit skulu minna á, at vanligi føroyski løntakarin neyvan fer at gloyma hesa ráðagerð, sum teir politikarar, sum siga seg stuðla verkamannafjøldini, her hava framt móti føroysku fakfelagsrørsluni.

Vit lýsa tí við hesum okkara fulla stuðul til Maskinmeistarafelagið og limir tess, og heita á øll fak-feløg um at standa saman móti áganginum frá sitandi samgongu.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.